# Vinnunevnd skal avloysa havnanevndina

KLÆMINT ØSTERØ
Valevni á lista B, til Runavíkar býráð



Tíðin, har týðningarmesta uppgávan hjá einari kommunu var at byggja og reka havnaløg er farin, og ein av høvðusuppgávunum verður at skapa karmar til eitt nógv meiri fjøltáttað vinnulív, enn tað vit kenna í dag.

Seinastu 4 árini havi eg sitið sum formaður í havnanevndini í Runavíkar kommunu, og hevur tíðin sannført meg um, at ein vinnunevnd eigur at avloysa havnanevndina.

Havnanevndin tekur sær sjálvandi av teimum málum, sum hoyra havnini til, men ofta umskarðast vinnulig áhugamál soleiðis, at tey kunnu fella uttanfyri málsøkið hjá havnanevndini.

Alt ov ofta hava mál av vinnuligum tídningi fingið ymiska viðger, alt eftir hvørji nevnd tey hava verið viðgjørd í. Hetta kann í ringasta føri elva til, at vinnuvirki leita upp aðrar kommunur at virka í.

Verður havnanevndin hinvegin umskipað til eina vinnunevnd, kunnu fleiri vinnugreinar samskipast undir somu nevnd við eini smidligari og dygdarbetri málsviðger.

Ein vinnusamskipari ella vinnustjóri skal tí setast í starv fyri at bøta um arbeiðsmarknaðarviðurskiftini, og til at veita vinnulívinum so góðar tænastur sum gjørligt.

Ein av fyrstu uppgávunum hjá vinnunevndini verður, saman við vinnulívinum í kommununi, at gera eina menningarætlan, sum skal tryggja framhaldandi búskaparvøkstur og trivnað í kommununi, ið eisini røkkur at sambondum við útlandið..

Harafturat skal nevndin syrgja fyri, at fyrireika kommununa til at taka ímóti teimum avbjóðingum og møgulleikum sum Skálafjarðartunnilin førir við sær.

Runavíkar kommuna skal framhaldandi virka fyri, at skapa nøktandi karmar og umstøður til verðandi vinnuvirkir og gerða tað áhugavert hjá fyri onnur at virka í kommununi.

Íverksetan, umboðan og netverkstiltøk v.m. skulu samskipast betur og kommunan skal syrgja fyri, at ein vitanargrunnur, sum verður alment atkomiligur, verður settur á stovn.

**Gott val**

# Ikki øktan skatt

JAN CHRISTIANSEN
býráðslimur og valevni á lista A



Umráðandi er, at kommunan ikki aftur verður skuldarbundin. Undanfarnu býráð gjørdu nógv fyri at gjalda niður skuld, tí tungt var at arbeiða, tá lánsgjøld fóru við stórum parti av inntøkunum. Tað eydnaðist eisini at gera kommununa skuldarfría, og nú skuldi verði lagamanni at fáa gjørt hópin av íløgum, ið komu fólkinum til gagns.

Men nei, verandi samgonga hevur brúkt alla meirinntøkuna til at pumpa rakstrarkostnaðin av kommununi upp. Seinastu fýra árini er raksturin øktur við ikki minni enn 180 mió.kr., og hevur tað gjørt, at einki meira hevur verið til íløgur, hóast eingi lánsgjøld hava verið, og inntøkur, ið hava verið betri enn nakratíð fyrr.

Nú er vandi fyri, at javnaðarflokkurin saman við tjóðveldinum fara at hækka skattaprosentið, fyri at tey framhaldandi kunna halda á við teirra skilaleysa fíggjarpolitikki.

Fólkaflokkurin hevur altíð havt ta áskoðan, at peningurin liggur best hjá borgaranum sjálvum, og bert við at krevja sum minst inn í skatti, vilja polittikaranir royna at fáa sum mest burtur úr. Seinastu fýra árini hava vit tíverri sæð, at ógvuliga lætt er fari um ta øktu inntøkuna kommunan hevur havt.

Fólkaflokkurin vil leggja alla orku í, at vit fáa meira fyri hvørja krónu, og at skattaprosentið ikki hækkar. Tað er ógvulig strævið hjá flestu familjunum at fáa endarnar at røkka saman, og er fólkaflokkurin garanturin fyri, at steinur ikki verður lagdur omana á byrðuna við eini skattahækking.

# Ungdómurin skríggjar eftir dansistaði

RÚNI DJURHUUS
valevni á lista C



Eg havi áður skriva um ungdómshús í Tórshavnar Kommunu. Nógv hava lisið greinina og eg eri fegin um, at nógv eru samd við mær um, at ungdómshús eiga at verða bygd í Havn, Hoyvík og á Argjum.

Tá eg tosi um ungdómshús, tosi eg ikki um eitt stað, har fólk koma inn at spæla pool ella at leggja kabalir. Tað hava vit í Margarinfabrikkini og tað riggar fínt.

Tað, sum eg meini við, er at vit hava tørv á einum diskuteki og live-spælistaði, har ungdómurin undir 18 ár kann koma saman at dansa og flippa út. Staðið skal vera opið frá kl. 22.00 til 03.30, og sjálvt tey, sum eru ávirkað av rúsdrekka, skulu vera vælkomin.

Heldur hava tey innan fyri dyrnar undir eftirlitið av vaksnum fólki, t.d. náttarravnum, sum gera eitt gott arbeiði, enn at tey ganga úti drukkin, uttan vit og skil. Tað skal vera pláss fyri øllum í Tórshavnar Kommunu.

Eg havi sjálvur leingi staðið fyri ungdómstiltøkum, men havi sum oftast havt trupulleikar við at fáa hølir. Eitt nú var kendi svenski Basshunter í Føroyum, har tey ungu spurdu meg, um tey ikki eisini kundu uppliva hann. Tað skuldi sjálvandi verið møguligt og tað hevði borið til við einum dansistaði fyri tey ungu.

Tey ungu í Tórshavn skríggja eftir einum dansistaði, og verði eg valdu, fari eg at arbeiða hart fyri at fáa hetta upp at standa.

# Frítíðarskúlatilboð til 3 flokk.

LEVI MØRK
valevni



Sum nú er er bert frítíðarskúlitilboð upp til 2 flokk. Eg vil arbeiða fyri, at børn í 3 flokki hjá Tórshavnar kommunu, koma at fáa tilboð um, at ganga í frítíðarskúla eftir 2 flokk. Sum nú er er bert frítíðarskúli, upp til 2 flokk.Eg havi sjálvur royndir, frá Frítíðarskúlanum í Hoyvík, har vit hava mong foreldur, sum ynskja hetta tilboði.

Sjálvandi skulu børnini eisini vera við uppá tað. Vit kunnu byrja við 3 flokki, sum eina roynd og síðani eftirmeta støðuna, út frá tørvinum. Eg vil 100% arbeiða fyri sakini.

Frítíðarklubb í nýggja skúlanum á Argjum.

Tað er komið, fleiri dagstovnar á Argjum, og tað er frálíkt, men her vantar nakað fyri ungdómin, tað er ov langt, at fara oman í býin hjá ungdóminum á Argjum. Eg meini, at ungdómurin á Argjum, kan brúka nýggja skúlan, á Argjum eisini til ungdómsklubb.

Har verður jú eisini frítíðarskúli, hví ikki kanna møguleikan, fyri at hava ungdómsklubb, uppá sama máta, sum tankin er at gera uppi í frítíðarskúlanum Hoyvík og í ítróttarhøllini í Kollafirði. Eg eri heitur talsmaður fyri hesum.

Í Nolsoy hava ungdómar einki.

Eg vil eisini arbeiða fyri, at ungómin í Nólsoy, fær betri kor. Her er einki frítíðartilboð til ungdómin.

# Hvar eru tey kommunalu grundstykkini

HØGNI MIKKELSEN
býráðslimur, Valevni Sambandsfloksins



Nógv hevur verið tosað um nøgdsemiskanningina, sum er almanna kunngjørd fyri kortum. Fólkatalið í Tórshavnar Kommunu er ikki vaksið nógv tey seinstu árini, og sjálvandi er ein av orsøkunum, at fólk ikki flyta til kommununa tann, at eingi grundgrundstykkir eru at fáa til keyps til ein sámuligan kostnað.

Sitandi samgonga skrivar og tosar um, hvat er gjørt í kommunini í hesum valskeiðinum. Eitt er vist, og tað er, at henda samgonga hevur ikki givið borgarum í kommununi møguleika at ogna sær eitt grundstykki, og tað er ein av orsøkunum til, at kommunan ikki veksur.

Sitandi samgonga arbeiðir við einari útstykking uppi í hoyvíkshaganum, stykkini eru 200 fermetrar og kostnaðurin er 575 túsund krónur, arbeiði er ongan veg komi, tí at fólk ikki kunnu gjalda henda høga prís. Tað er synd at siga, at sitandi samgonga ger nakað fyri at útvega grundstykkir fyri ein rímuligan kostnað.

Henda trupulleika vil eg loysa, um eg verði valdur.

# Tann rúmligi høvuðstaðurin

JÓGVAN ARGE
varaborgarstjóri, valevni á Lista E



Høvuðsstaðurin er og eigur at vera høvuðsstaðurin. Hann hevur eina aðra støðu og aðrar skyldur enn hinar kommunurnar.

Sum høvuðsstaður tekur Tórshavnar kommuna upp á seg uppgávur, sum ongin annar megnar, og hesar tænastur koma øllum landinum til góðar.

Hesum hava vit í Havn onki ímóti. Vit vilja fegin, at høvuðsstaðurin er rúmligur og er staðið, hagar fólk leitar í ørindum, til arbeiðis, til handils og til gamans.

Vit eru errin av, at Havnin hevur so nógv at bjóða, og vit leggja ikki skatt á fólk, sum koma av bygd higar at arbeiða og annars njóta tær tænastur, sum her eru.

Høvuðsstaðurin vil fegin vera rúmligur og vil kunna bjóða teimum ungu hendanvegin at búleikast í einum býarsamfelag, sum vil nakað, men afturfyri má hann eisini hava neyðugar sømdir, so hann kann røkja sína uppgávu til lítar.

Nýskipan av kommunalu viðurskiftunum í Føroyum gongur hjá nógvum út upp á at skerja høvuðsstaðin. Hetta er stuttskygd og lítið skilagóð tala.

Sjálvsagt eigur høvuðsstaðurin at vera við í kjakinum um, hvussu vit menna alt landið, men tosið um nærum ótálmaða útjavning kann elva til beinleiðis afturstig fyri alt samfelagið.

Afturstigið kann gerast, at høvuðsstaðurin missir dampin og orkuna at toga Føroyar framá. Tá er onki vunnið fram á leið.

Ein kipt høna verpur sum kunnugt ongi egg. Ein kiptur høvuðsstaður byggir onki land.

Havnin er og verður høvuðsstaðurin, og Havnin eigur tí at verða viðfarin sum høvuðsstaður.

Vel trygga leiðslu í Tórshavnar Kommunu 11. november. X við E.